Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Ove Ritter, seniorsersjantur, 25 ára starvsdag:

# Kendur motorsúkklumaður heiðraður í Mjørkadali



*Stjórin fyri Færøernes Kommando, J.T. Leisborch, kommandørur, handar her Ova Ritter diplom í sambandi við 25 ára starvsdagin*

*Mynd: Færøernes Kommando*



*Ove Ritter og Thomas Michael Smith, frá áhugafelagnum Føroya Ellisakfør, sum segði nøkur góð orð um Ova*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

**Mánadagin 2. februar var móttøka í Mjørkadali í sambandi við at Ove Ritter, seniorsersjantur, hevði 25 ára starvsdag. Ove hevur búð í Føroyum síðan 1982 og er kanska mest kendur fyri sín áhuga fyri motorsúkklum, serliga Harley Davidson**

Ove er upprunaliga útbúgvin sum amboðssmiður. Nakað eftir at hann varð útlærdur, bleiv hann innkallaður til hertænastu.

Sína sersjantútbúgving hevur hann fingið innan danska herin, har hann byrjaði fyri 25 árum síðan. Hann var á Cypros í ST-tænastu, áðrenn hann kom til Føroyar í 1982 og bleiv settur sum leiðari av "Bevogtningstjenesten" á Flyvestation Tórshavn. Hann kom eisini at standa fyri eftirútbúgving av starvsfólkum á støðini.

Fyrst í 90-unum arbeiddi hann í trý ár á Flyvestation Værløse. Í hesum tiðarskeiði var hann eisini í Kuwait í ST- ørindum.

Í 1995 byrjaði hann aftur í Mjørkadali. Tó var hann, í 1997, eitt ár á "Eskadrille 500" í Vedbæk, og í 2002 var hann við í altjóða friðardeildini í Kirgisistan.

Ove Ritter er annars best kendur fyri sín stóra áhuga fyri motorsúkklum, serliga Harley Davidson, sum hann í dag selur og leigar út. Hann hevur eisini skipað fyri fleiri motorsúkklutúrum bæði í Føroyum og í grannalondum okkara.



*Familjan var eisini við til móttøkuna, Anna og Ove Ritter saman við synunum Petur, 18 ár, og Hans Kristian, 13 ár*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Ina og John Christiansen høvdu eisini leitað sær niðan í Mjørkadal hendan dagin*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Til stórabeigga mín

## Henning Eysturoy

### á føðingardegnum 4. februar



4. februar verður jarnstoyparin Henning Eysturoy úr Havn 70 ár.

Henning er elsti sonur stoyparan Absalon og Gertrud Eysturoy, og tí fall tað í hansara lut -at fáa somu útbúgving sum pápi okkara, at gerast formari ella sum vit siga, jarnstoypari. Tá pápi okkara í 1973 var farin undir grønu torvu, tók Henning yvir. Stoypivirkið var yviri við Strond til fyrst í 80-unum, tá kommunan keypti øki.

Um somu tíð hevði hann keypt eina ogn við Marknagilsvegin og bygdi har eitt serstakt hús til Stoypivirki. Tíverri brendi nýbygda stoypivirki fá ár seinni í grund, og tað var aðru ferð, at tú stóð við einum niðurbrendum húsum, tí í 1968 brendu sethúsini í Vaktarhúsbrekku eisini í grund. Í slíkum umstøðum er skjótt at falla í fátt, men í tí støðuni vísti tú tína serstøku styrki og títt lyndi til ongantíð at falla í fátt, men fór við áræði at byggja uppaftur.

Tá áttamannafarið hjá tær "Havreki" á vári 1975 sakk við Gjógv, vísti tú aftur áræði og viljastyrki at fáa bátin aftur at sigla, og tað eydnaðist tær.

Hóast hettar og aðrar trupuleikar í lívinum hevur tú ongantíð verið mótfallin. Tú hevur við tínum skemtingarsama lyndi víst okkum, at ikki er vert at falla í fátt, men at síggja tað positiva í lívinum. At vert er at herja á fyri at betra um umstøðurnar og royna at gloyma trupuleikarnar, ið stinga seg upp.

Sum ungur vart tú ein sera góður svimjari, og tí fóru vit í felag at undirvísa í vaksnamanna-svimjing í Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla. Teir tímarnar gloymi eg ongantíð og hoyri mangan næmingarnar okkara siga frá, hvussu stuttligt tað var.

Ítróttur og serstakliga hondbóltur var títt hjartamál, og tú brúkti nógva tíð og orku at faa alt samskipað.

Nevndarlimur vart tú í fleiri ítróttarfeløgum og sambondum, ið gjørti at tú eitt árið setti Ólavsøkuna.

Hetta var áðrenn ISF varð stovnað, men sum tú – við tínum áræði - ótilvitað hevur verið við til at fáa sett á stovn.

Henning, eg kundi skriva so mangt til tín og um teg, men umstøðurnar hjá mær eru í løtuni ikki tær bestu, men kortini skalt tú hava nøkur takkarorð frá mær. Hjartaliga tillukku við teimum 70 árunum og eg vóni at tú fært ein góðan og hugnaligan dag.

Hjartaliga tillukku frá systir tíni

**Solveig**

## Maria Johannesen í Smiðjuni



**Fríggjadagin 30. januar lat Maria Johannesen úr Leirvík upp eina málningaframsýning í Smiðjuni í Líluvík í Havn**

Í sambandi við ferniseringina var livandi tónleikur, har Høgni Lisberg sang við gittarspæli og Maria sjálv sang eisini við gittar undirspæli av Tórfinni Jákupsson.

Talan er um religiøsar myndir í sterkum litum.

Maria hevur gingið á Rønde Højskole í Danmark, har hon hevur lært seg meira innan málninga- og leirlist og tónleik.

Maria er 20 ára gomul og úr Leirvík, dóttir Simonu og Tom Johannesen. Yngra systirin, Jonna, hevur eisini havt framsýning í Gallarí Ribarhús í Fuglafirði.

Framsýningin í Smiðjuni er opin til og við í dag, mikudagin 4. februar, frá kl. 17.00 til umleið kl. 20.00.

### Dagurin

4. februar. Veronica. Vit vita einki um hesa halgikvinnu uttan tað, sum halgisøgan sigur, at hon var ein, ið fylgdist við Jesusi, og at hon á leiðini út til Golgata turkaði sveittan av andliti hansara. Tá ið hon fekk turruklæði aftur, stóð mynd frelsarans á tí, og tað varð síðani varðveitt sum ein dýrur gripur. Hann varð róptur vera ikon, sum merkir tann sanna myndin. Harav kemur eisini navnið á halgikvinnuni.

# Eitt ár síðan Bussleiðin bleiv umskipað

**1. februar 2004 var eitt ár liðið síðan Bussleiðin í Havn bleiv umskipað soleiðis, at ein busseigari eigur og rekur allar býbussarnar**

Bussleiðin byrjaði fyri skjótt 25 árum síðan. Tá var tað P/F Bil sum rak bussarnar fyri Tórshavnar Býráð.

Fyri 20 árum síðan, í 1984, bleiv Bussleiðin umskipað soleiðis at fýra busseigarar áttu og róku hvør sínar tveir býbussar, teir vóru: Arni Berg, Gunnleif Danielsen, Sámal Bláhamar og Mourits Mouritsen.

Síðan 1. februar 2003 hevur Mourits Mouritsen átt og rikið allar býbussarnar í Havn.




*Starvsfólk hjá SB Bussum: f.v. Jákup Danielsen, Jónlaug Danielsen, Sámal Bláhamar og Annfinn Bláhamar. SB Bussar var ein av fyritøkunum sum rak Bussleiðina frá 1984-2003*

## Tøkk

Eg takki hjartaliga øllum tykkum, sum á ymiskan hátt heiðraðu meg á 80 ára degnum 27. januar, og ikki minst tykkum, sum komu úr Havn og annars tykkum mongu, ið stukku inn á gólvið.

Ein serstøk tøkk til døturnar við familju fyri ein minnisríkan dag.

**Vinarlig heilsan**
**Groth Larsen**